SJÚKRAHÚS VERKIÐ

# Oyrnaspýttkertil – skurðviðgerð

## Um skurðviðgerðina:

Oyrnaspýttkertilin (glandula parotis) liggur undir og framman oyrnaflippuna á báðum síðum av andlitinum. Andlitsnervin (nervus facialis) greinast í kertlinum í sínari rás framm móti andlitsvøddunum. Nervin ger, at man kann blunda, smílast og flyta pannuna. Eisini smáar træðrir fara út til spýttrefleksini á kertlinum.

Undir skurðviðgerðini verða knútarnir tiknir við nærliggjandi partum við spýttkertlavevnaðinum. Tað kann vera partvís ella totalt tøka av kertlinum, hetta er tengt at stødd og lokalisatión av knútinum. Tann samlaða spýtproduktiónin er tó ríkiligt og ein total tøka av kertlinum gevur ikki munnturrheit.

Skurðviðgerðin verður gjørd í fullari doyving gjøgnum ein S-formaðan skurð framman fyri oyra og niður á hálsin. Viðhvørt verður eitt dren lagt í skurðin, so yvirskotsvæta og –blóð kann renna í posa.

## Eftir skurðviðgerðina:

Summi hava ilt í nakkanum eftir skurðviðgerðina, tí høvdið hevur verið afturábent.
Vanliga verður tú útskrivað/ur 1-2 dagar eftir skurðviðgerðina. Um tú hevur fingið lagt dren, verður hetta tikið áðrenn tú fert heim.
Sjúkramelding verður avtalað við skurðlæknan.
Tú kanst brúsa tær, tá møguliga drenið er tikið, plástrini skulu tó haldast turr. Bað og svimjing er frámælt fyri 10 dagarnar eftir skurðviðgerðina vegna vanda fyri bruna.
Tú fært eina tíð til kontroll og svar upp á kanningina av vevnaðinum.
Fyri best møguligt kosmetiskt úrslit, er tað gott at ikki fáa beinleiðis sól á arrið fyrsta árið, evt. dekka við plástri ella nýta sólkrem, gjarna faktor 50).

## Møguligar komplikatiónir/eftirsjúka:

Um tað fer at bløða eftir skurðviðgerðina, kann ein blóðsamling verða undir húðini. Í so fall kann verða neyðugt at opna skurðin aftur undir fullari doyving.

Vegna rásina av andlitsnervini er tað ein vandi fyri at ávirka nervina. Ein skaði førir til niðursettan andlitsmimikk sv.t. teir musklar verða forsýndir av tí nervagreinini. Nógv rørsla við sjálva nervina ella greinarnar kann geva forbígangandi lammilsi, sum vanliga batnar innan 3 vikur. Um nervin verður skorin yvir, kemur tilsvarandi muskulfunktión tó ikki aftur.

Ein følinerv, som er til meginpartin av ytra oyra, liggur undir húðini og hevur eina rás sum vanligt liggur tvørtur um økið, har skurðurin verður. Tað er ikki óvanligt, at hendan nervin ikki verður varðveitt, sum førir til manglandi ella broyttan følisans av ytra oyra – eitt sokallað “pappoyra”. Eisini kann tað henda, at følisansurin er øktur ella skriðja við hitabroyting. Hoyrnin verður ikki ávirkað av skurðviðgerðini.

Í nøkrum førum hevur lekingin av vevnaði við sær ein samanvøkst av teimum nervatræðrunum, sum áður stýrdu spýttrefleksina, við berum endnum av sveittakertlunum í húðini. Hetta kann føra til roða ella sveitta runt um skurðin, tá etið verður ella tá ein sær mat. Fá uppliva spýtsekretión frá skurðinum. Hetta verður kallað Frey’s syndrom.

Fáir sjúklingar fáa bruna í sárið. Tekin upp á bruna eru: *Trot (hævilsi), roði, eymleiki, møguliga febur*

Um tú fært tekin upp á bruna ella órógvandi vætusamling, eigur tú at ringja til lækna. Gerandisdagar kanst tú ringja til Oyrnadeildina kl 10-12 á tlf.nr. 304622. Annars setur tú teg í samband við tín kommulækna ella læknavaktina á 1870.

Okt. 2025

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo